# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Edward Fuglø í Galerie Focus

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 2. juni kl. 16 til 18 letur ein framsýning við málningum hjá Edward Fuglø upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Vit kenna mest Edward Fuglø frá at hann hevur sett pallmyndir upp, t.v.s. at gera scenografi til ymiskar framførðslur. Tá man so tekur og setur eitt frímerki á ein brævbjálva, so er Edvard Fuglø aftur har, hann hevur fingið virðisløn fyri eitt tað vakrasta frímerki í Europa í 2003. Í Føroyum er Edward Fuglø eisini kendur fyri at byrja Leikalund. Handilin Leikalund, í Gamla Klaksvíks-handlinum, selur bøkur, tónleikalist o.m.a og skipar fyri skiftandi myndaframsýningum. Edward Fuglø er føddur í 1965 í Klaksvík, hann hevur list- og designútbúgving.



*Fríggjadagin 2. juni kl. 16 til letur ein framsýning við málningum hjá Edward Fuglø upp í Galerie Focus*

Mynd: Jens Kristian Vang

Myndevnið hjá Edward Fuglø hevur verið ymisk dýr og menniskjur. Á framsýninggini í Galerie Focus er myndevnið Fjallabrúður.

Framsýningin verður opin til 15. juni, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

Faroe Dive, Klaksvík:

## Tveir kavarar fingið prógv

TÍÐINDASKRIV

Heri N. Vestergaard, Sumba, og John Larsen, Tórshavn, hava fingið prógv sum havkavarar frá kavaraskúlanum Faroe Dive í Klaksvík. Teir hava seinastu vikurnar staðið royndir í ástøði, kaving í svimjihøll og ikki minst kaving í sjónum. Teir umhugsa at útbúgva seg enn meira innan kaving.



*Á myndini síggjast f.v.: Heri N. Vestergaard, Sumba, og John Larsen, Tórshavn, eftir seinasta kavið á grundskeiðnum*

## Listaframsýning

Mentanarnáttina, fríggjadagin 2. juni kl. 18.15, letur listamaðurin Olivur við Neyst upp framsýning í forhøllini í Snarskivuni á Vaglinum.

Sum tannáringur steig Olivur við Neyst fótin inn um gáttina í føroyska listaheiminum. Á eini listaframsýning á Norðoyastevnu fyrst í 1970-árunum, vísti hann á fyrsta sinni almenninginum sínar listarligu gávur. Um hetta mundið vóru nógv listafólk í Klaksvík, og í hesum umhvørvi var lívsleiðin hjá honum gróðursett.



Hetta er fyrstu ferð, at hann einsamallur hevur framsýning í Snarskivuni, men hansara listaverk hava áður verið at sæð á ljósa vegginum í forhøllini saman við øðrum listafólki.

Olivur við Neyst hevur havt nógvar framsýningar í Føroyum og uttanlands. Hann hevur prýtt skúlan í Porkeri og á Lágargarði, umframt at hann hevur teknað myndir til skúlabøkur og barnabøkur. Í 1990 fekk hann barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs fyri tekningarnar í bókini Spell at sólin kom upp, sum Martin Næs skrivaði.

Til hesa framsýningina, ið er ein søluframsýning, hevur Olivur arbeitt við vatnlitamyndum og oljumálningum.

Myndevnini eru ikki ókend: bygdir, landsløg og skip, ið hann mangan í sínum skapandi arbeiði leitar aftur á, men altíð við nýggjum íblástri og strokum, tí Olivur er fjølbroyttur listamaður.

Øll eru vælkomin at síggja listaframsýningina í vanligu upplatingartíðini hjá Snarskivuni, mánadag til fríggjadag kl. 9-16, tó hósdag kl. 9-18.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Heina Sigfred Jacosen** ættaður úr **Klaksvík**, kemur til Vágar hósdagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni fríggjadagin 2. juni kl. 13.30.

**Anker Borgardal, Sandvík**, andaðist mánadagin á Landssjúkrahúsinum, 41 ára gamal. Farið verður úr kapellinum fríggjakvøldið kl. 18 til Smyril. Jarðarferðin verður úr Sandvíkar kirkju leygardagin kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Anker kunnu lata børnunum eina peningagávu. Konto í Føroya Banka.

## Tøkk

Hjartaliga takk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt gjørdu 90 ára føðingardag mín ógloymandi.

**Blíðar heilsur**
**Sunneva Gram**

**Dagurin í morgin**

**2. juni. Marcellinus**, prestur í Róm, sum varð hálshøgdur umleið ár 300.

Kommunusamskipan Føroya:

## Jóan Petur Hentze nýggjur aðalskrivari



*Rodmundur Nielsen, frá Kommunusamskipan Føroya, og Jóan Petur Hentze, sum er settur í starv sum aðalskrivari*

TÍÐINDASKRIV

Kommunusamskipan Føroya hevur í dag sett Jóan Petur Hentze í starv sum aðalskrivari.

Jóan Petur er 35 ár, er útbúgvin cand. mag. og hevur hollar og fjølbroyttar fyrisitingarligar royndir í miðfyrisiting og almennu umsitingini.

Jóan Petur byrjar í starvi 1. juli.